# Ein serstakliga væleydnaður sjómannadagur

**Føroya Sjómannadagur er av fyri hesaferð og skoðsmálið, sum tiltakið fær, er, at tað eydnaðist avbera væl. Veðrið var gott, og fólk høvdu nógv at fara til allan dagin. Ongum nýttist at keða seg í Klaksvík seinasta leygardag, tá ið hópur av tiltøkum vóru á skránni**



SJÓMANNADAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var einki, sum bendi á, at klaksvíkingar vóru troyttir av at skipa fyri stórum tiltøkum í summar, tá ið Føroya Sjómannadagur á øðrum sinni varð hildin í Klaksvík í síðstu viku.

Skráin hesaferð var munandi rúgvusmiklari og fjølbroyttari enn á sjómannadegnum í fjør, sum var hin fyrsti av slíkum slagi í Føroyum.

Tey fyrstu tiltøkini á sjómannadegnum í ár byrjaðu longu týsdagin, 15. august og tey seinastu vóru sunnudagin, 20. august.

### Fjøllbroytt skrá

Leygardagurin var dagurin, tá nógv tey flestu tiltøkini vóru á skránni.

Almenna setanin var leygarmorgunin. Tað var borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, sum beyð vælkomin, og síðan setti landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, alment Føroya Sjómannadag.

Leygardagin varð skipað fyri fleiri føroyameistarakappingum, eitt nú í agnskering, trolbøting og egning. Kappingar vóru eisini í at kasta lodd, halda dreggi, og haraftrat var føroyameistarakapping í sjómanstaki.

Skipsmanningar vóru eisini við í spurnarkapping og í togtogan, og steypahandan var til bestu skip og bátar í Føroyum.

Norðoya Bjargingarfelag skipaði fyri bjargingarroynd á vánni, og standmynd varð avdúkað á fiskastykkinum hjá Kjølbro.

### Hópur av fólki

Veðrið var gott leygardagin, og leygarkvøldið endaði við sera væl eydnaðum tiltaki, "dans på brygga", har hópur av fólki hugnaðu sær saman.

Sunnudagin var sjómansgudstænasta í Christianskirkjuni, og sunnukvøldið endaði við sjómansmøti í tjaldinum á bryggjuni.

Fyrireikararnir meta, at eini 7.000-8.000 fólk vitjaðu ymisku tiltøkini, sum vóru í Klaksvík á Føroya Sjómannadegi.

Klaksvíkingar eiga stóra tøkk og stóran heiður uppibornan fyri hetta serstakliga væleydnaða og fjølbroytta tiltak, bæði til gamans og álvara.

### Fyrimyndarligt tiltak

Hóast sjómannadagurin í stóran mun lýsir viðurskifti, sum hava við sjófólk og sjóvinnu at gera, var hetta kortini dagurin, har øll – bæði ung, tilkomin og eldri, kunnu vera við og fáa nakað burtur úr.

Hetta var eitt fyrimyndarligt tiltak, sum hevði nakað fyri øll.



*Føroya Sjómannadagur hevði nakað til øll, og fólk hugnaðu sær í góðveðrinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Skipað varð fyri fleiri FM*